INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

16. februar 2010
Mál: 7005-007/08
Tygara skriv:
Viðgjørt:RJ/NF/nb

Løgtingsmál nr. /2009: Uppskot til løgtingslóg um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð

Uppskot

til

løgtingslóg um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð

Kapittul 1
Veitan av einkarætti

§ 1. Endamálið við hesi løgtingslóg er at áseta karmarnar fyri einum tíðaravmarkaðum einkarætti til at byggja, reka og fíggja ein undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð.

§ 2. Landsstýrismanninum verður heimilað at lata P/F Skálafjarðartunlinum ein tíðaravmarkaðan einkarætt til fyri egna rokning og váða at byggja, reka og fíggja ein undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð. Tunnilin skal knýta Suðurstreymoy saman við suður Eysturoy.
Stk. 2. Einkarætturin skal verða latin P/F Skálafjarðartunlinum í seinasta lagi tann 1. november 2010.
Stk. 3. Um landsstýrismaðurin ikki nýtir heimildina at geva P/F Skálafjarðartunlinum einkarættin áðrenn tann 1. november 2010, fellur heimildin burtur, uttan so at landsstýrismaðurin í staðin ger av at bjóða út einkarættin í fríari kapping, við tí endamáli at geva øðrum einkarættin.
Um so er, verður landsstýrismanninum heimilað at gera ein sáttmála um einkarætt við tann, sum út frá einari samlaðari meting má metast at hava givið besta tilboðið.
Stk. 4. Einkarætturin verður veittur sambært treytum, ásettar í sáttmála millum landsstýrismannin og tann, sum fær einkarættin.
Stk 5. Einkarætturin verður treytaður av, at landsstýrið fær endurrindað kostnaðin

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo

í sambandi við fyrireiking og gerð av sáttmálanum um einkarætt, innan fyri eina upphædd upp á ávíkavist 10 mió. kr. og 15 mió. kr., treytað av, um einkarætturin verður veittur P/F Skálafjarðartunlinum ella øðrum sambært § 2, stk. 3.

Kapittul 2
Vavið av einkarættinum

§ 3. Hann, sum fær einkarættin, kann fyri egna rokning og váða projektera, byggja, reka, viðlíkahalda og fíggja tunnilin. Hann hevur somuleiðis rætt og skyldu til at krevja gjald frá teimum, ið nýta tunnilin, samsvarandi meginreglunum í hesi løgtingslóg og treytunum í sáttmálanum um einkarættin.

§ 4. Einkarætturin avmarkar ikki rættin hjá landsstýrinum at gera aðrar útbyggingar av infrakervinum.
Stk. 2. Landsstýrið hevur tó skyldu at halda honum, sum fær einkarættin, skaðaleysan fyri tapum, ið beinleiðis standast av ítøkiligum verkætlanum, ið eru í kapping við tunnilin, og sum hava við sær, at ferðslan í tunlinum minkar. Tapið verður staðfest við støði í miðaltalinum fyri ferðsluna tað seinasta árið, áðrenn verkætlanin varð framd, og miðaltalinum fyri ferðsluna árið eftir.
Stk. 3. Ásetingarnar í 2. stk. fevna ikki um fyribils broytingar í infrakervinum orsakað av vanligum viðlíkahaldi av vegum, tunlum o.l.

Kapittul 3
Avhendan av einkarættinum

§ 5. Hann, sum hevur fingið einkarættin, kann avhenda hann.
Stk. 2. Uttan so, at onnur avtala er gjørd við landsstýrismannin, kann einkarætturin tó ikki avhendast fyrr enn 2 ár eftir dagin, at tunnilin er tikin í nýtslu og hevur verið rikin á nøktandi hátt.
Stk. 3. Hann, sum hevur ella fær einkarættin, skal til eina og hvørja tíð víkja fyri rættindunum hjá landinum sambært sáttmálanum um einkarætt.
Stk 4. Landsstýrismaðurin skal kunnast, áðrenn einkarætturin verður avhendaður, og kann, tá ið serligar orsøkir eru til at ivast í fíggjarliga ella fakliga førleikanum hjá tí, sum fær einkarættin, nokta fyri einari og hvørjari avhendan.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann somuleiðis nokta at góðkenna eina avhendan av einkarættinum, um so er, at landsstýrið sjálvt ætlar at taka yvir tunnilin samsvarandi treytunum í sáttmálanum um einkarætt.
Stk 6. Um so er, at landsstýrismaðurin ætlar at nokta fyri einari avhendan sambært stk. 4 og stk. 5, skal hann boða frá hesum í seinasta lagi 3 mánaðir aftaná, at tann, sum hevur einkarættin, skrivliga hevur kunnað landstýrismannin um ætlaðu avhendanina.
Stk 7. Um so er, at val er útskrivað til Løgtingið, tá ið avhendanin verður fráboðað, ella um val verður útskrivað teir komandi 3 mánaðirnar, verður freistin longd við 1 mánaða.

Kapittul 4
Einkarætturin fellur burtur

§ 6. Rætturin til at byggja og reka tunnilin fellur burtur, um so er, at arbeiðið at gera tunnilin ikki er byrjað í seinasta lagi 2 ár aftan á dagfestingina av sáttmálanum um einkarættin. Landsstýrismaðurin kann tá gera av at bjóða út alment einkarættin við tí endamáli at gera sáttmála við annan sáttmálapart sbrt. treytunum í § 2, stk 3.

Stk 2. Hetta er tó ikki galdandi, um so er, at orsøkin til, at arbeiðið ikki er byrjað, er orsakað av force majeure. Um so er, at force majeure verður staðfest, verður freistin longd samsvarandi tíðarskeiðinum, sum force majeure hevur verið galdandi, tó ikki í meira enn 12 mánaðir.
Stk. 3. Partarnir kunnu avtala at leingja freistina, um so er, at serlig viðurskifti gera seg galdandi.
Stk. 4. Heldur einkarætturin uppat, rindar hann, sum hevur einkarættin, sjálvur allar útreiðslur, sum hann hevur havt orsakað av verkætlanini.
Stk 5. Fellur einkarætturin burtur, hevur landsstýrið heilt ella lutvís rætt til at taka yvir úrslitið av kanningum o.ø í sambandi við byggingina av tunlinum afturímóti at rinda eina rímiliga fíggjarliga samsýning.
Stk 6. Um so er, at verkætlanin verður framd, áðrenn 4 ár frá tí, at einkarætturin fellur burtur av landsstýrinum sjálvum ella av øðrum enn honum, sum upprunaliga fekk einkarættin, og úrslitini av kanningum hjá honum, sum upprunaliga fekk einkarættin, í meira enn í minni mun mugu metast at hava verið viðvirkandi í hesum sambandi, skal landsstýrið halda hann skaðaleysan fyri allan kostnað í sambandi við verkætlanina, innan fyri eina mestu upphædd upp á 25 mió. kr.
Stk 7. Ásetingin í stk. 6 er tó ikki galdandi, um so er, at einkarætturin er hildin uppat, orsakað av umstøðum, sum nevndar eru í § 8 í hesi lóg.

Uppathald av einkarættinum

§ 7. Einkarætturin heldur uppat samstundis, sum tunnilin verður avhendaður til landsstýrið, sbr. meginreglurnar í § 9, stk. 1.

§ 8. Einkarætturin kann verða tikin aftur av landsstýrismanninum, um so er, at tann, sum hevur einkarættin, grovt ella fleiri ferðir setir sínar skyldur sambært hesi løgtingslóg og sáttmálanum um einkarættin til viks.
Stk. 2. Um so er, at einkarætturin verður tikin aftur, fellur tunnilin til landsstýrið í samsvari við treytirnar í sáttmálanum um einkarættin.

Kapittul 5
Meginreglur fyri einkarættinum

§ 9. Einkarætturin verður veittur innan fyri hesar karmar og tekur støði í hesum meginreglum:
1) Tunnilin verður gjørdur og rikin sum ein gjaldsvegur og verður fíggjaður av honum, sum fær einkarættin, uttan váða og uttan veðhald, herundir fíggjarligt veðhald frá landsstýrinum.
2) Tunnilin verður rikin sambært vanligum marknaðartreytum við fríari prísáseting, samstundis sum atlit verða tikin til at fáa eitt gott og fíggjarligt atkomuligt infrakervi, grundað á umhvørvisvinarligar burðadyggar treytir, møguliga við ymsum sløgum av gjøldum.
3) Tunnilin verður latin landsstýrinum, tá ið samlaði kostnaðurin av byggingini er afturgoldin, og tá ið hann, sum hevur fingið einkarættin, hevur fingið eitt avtalað avkast av síni íløgu.

Avkastið verður ásett við grundarlagi í marknaðartreytunum og við atliti at váðanum av íløguni hjá honum, sum fær einkarættin. Avtala verður gjørd við hann, sum fær einkarættin, at tunnilin skal latast landsstýrinum aftur aftaná eitt ávíst áramál, uttan mun til um hann tá ikki hevur fingið tað avtalaða avkastið av síni íløgu. Avtala kann tó verða gjørd um at leingja hetta áramál, um so er, at serligar umstøður gera seg galdandi.
4) Tunnilin verður latin aftur uttan kostnað og uttan skuld og aðrar byrðar.
5) Landsstýrismaðurin hevur í øllum tíðarskeiðinum, har einkarætturin er galdandi, rætt til við ávísum varsli at keypa tunnilin samsvarandi ásettu treytunum í sáttmálanum um einkarættin.
6) Landsstýrismaðurin skal góðkenna endaligu tunnilsverkætlanina, áðrenn farið verður undir arbeiðið at gera tunnilin. Somuleiðis skal landsstýrismaðurin góðkenna tunnilin, áðrenn hann verður tikin í nýtslu.
7) Hann, sum fær einkarrættin skal til eina og hvørja tíð tryggja persónar, ognarlutir o.a. í sambandi við verkætlanina, á nøktandi hátt.
8) Hann, sum fær einkarættin, hevur skyldu til at tryggja eina effektiva og fíggjarliga ábyrgdarfulla stýring av verkætlanini, bæði í byggitíðarskeiðinum og í rakstrartíðarskeiðinum.
9) Tunnilin skal í einum og hvørjum lúka treytir í galdandi lóggávu og normum.
Stk. 2. Tær meginreglur, ið eru ásettar omanfyri, verða ásettar nærri í sáttmálanum um einkarættin.

Kapittul 6
Skattur, avskrivingar og meirvirðisgjald

§ 10. Frá og við árinum, tá tunnilin verður latin upp fyri ferðslu, hevur hann, sum fær einkarættin, við grundarlagi í útveganarkostnaðinum rætt til skattligar avskrivingar samsvarandi reglunum um vinnuligar bygningar. Við útveganarkostnaðin skilst tær samlaðu byggiútreiðslurnar til vegir og tunnilsgerð v.m.
Stk 2. Rættin til skattligar avskrivingar hevur tann, sum hevur fingið einkarættin. Hann kann ikki nýta møguligt skattligt undirskot, sum er avleitt av tunnilsverkætlanini, í felagnum, sum hevur fingið tillutað einkarættin, við samskatting við onnur feløg. Tað sama ger seg galdandi við møguligum yvirskoti.

§ 11. Virksemið hjá honum, sum hevur fingið einkarættin, er meirvirðisgjaldskyldugt. Hann, sum hevur fingið einkarættin, hevur rætt til endurrindan av útgangandi meirvirðisgjaldi og skyldu at avrokna inngangandi meirvirðisgjald. Tað er ein treyt, at tunnilsgjaldið er meirvirðisgjaldskyldugt. Hækkar meirvirðisgjaldið fyri nýtslu av tunlinum, hevur felagið rætt til endurgjald fyri skjalprógvað tap,

um so er, at tapið kann staðfestast sum fylgja av hækkingini av meirvirðisgjaldinum, og at úrslitið av hesum er minni ferðsla sbr. § 4, stk 2.

Kapittul 7
Vegstøða og linjuføring

§ 12. Tunnilin er ikki partur av landsveganetinum sambært løgtingslóg nr. 51. frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin hevur tó tær heimildir, sum eru ásettar í løgtingslóg nr. 51. frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum og í løgtingslóg nr. 14 frá 2. mars 1988 við seinni broytingum um ferðslu, vegum og tunlum viðvíkjandi.
Stk. 3. Skelti- og avmerking skal gerast samsvarandi galdandi kunngerð og ferðsluavmerkingar. Øll skelting og vegavmerking skal góðkennast av ferðslumyndugleikanum og landsvegamyndugleikanum.
Stk. 4. Tann, sum hevur fingið einkarættin, hevur rætt til uttan viðurlag at hava tunnilin íbundnan í almenna veganetið.
Stk 5. Við íbinding í landsvegin skal hann, sum hevur fingið einkarættin, gera og avhalda útreiðslurnar fyri møguliga umlegging av landsveganetinum. Hann, sum hevur fingið einkarættin, skal rinda fyri íbindingar, uttan mun til um tað er rundkoyring ella onnur íbinding. Um so er, at tunnilin kemur inn í landsveg, verður tunnilin partur av landsvegnum, og ongarrætturin fellur til landsstýrið.

§ 13. Tunnilin verður lagdur sambært linjuføring norðan fyri Tórshavn við rundkoyring, har annar armurin kemur út í Runavík og hin á Strondum.

Kapittul 8
Ognartøka

§ 14. Landsstýrismaðurin kann ognartaka neyðugt lendi ella tilfar fyri at fremja verkætlanina, um so er, at semja ikki verður fingin við teir, sum hava rættindir yvir lendinum ella tilfarinum.
Stk. 2. Ongartøka verður gjørd móti fullum endurgjaldi.
Stk. 3. Ognartøka verður framd sambært "lov nr. 69 frá 7.mai 1881 om forpligtigelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler på Færøerne".
Stk. 4. Landsstýrið skal avhenda tað ognartikna til hann, sum hevur fingið einkarættin, fyri útveganarkostnað.

Kapittul 9
Upplýsingar frá Akstovuni

§ 15. Hann, sum hevur fingið einkarættin, hevur rætt til uttan viðurlag at fáa upplýsingar frá Akstovuni um brúkarar og ánarar av akførum, við tí endamáli at krevja inn gjald fyri nýtslu av tunlinum.

Kapittul 10
Gildiskoma

§ 16. Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

1. Orsøk til lógaruppskotið

Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila landsstýrinum at geva einum privatum felagi (loyvishavari) ein tíðaravmarkaðan einkarætt at gera vega- og tunnilssamband undir Skálafirði og Tangafirði, sum fer at binda saman sunnara part av Streymoynni við sunnara part av Eysturoynni, umframt tilhoyrandi atkomuvegir og íbindingarannlegg (tunnilin).

Lógaruppskotið skipar undirstøðið fyri tillutan av einkarættinum og almennu meginreglurnar fyri útinnanini av honum. Einkarætturin verður givin við støði í eini loyvisavtalu milum landsstýrið og loyvishavaran, sum innan fyri karmarnar í hesi lóg ásetir tær nærri treytirnar fyri útinnanini av einkarættinum.

Einkarætturin ætlast í fyrstu syftu at verða givin til felagið P/F Skálafjarðartunnilin, sum er felagið, sum Eik Grunnurin og Lív eiga saman.

Einkarætturin verður givin, móti at loyvishavarin rindar landsstýrinum viðskiftisútreiðslurnar í sambandi við gerð av avtaluni, tó í mesta lagi kr. 10 mió. kr., ella 15 mió. kr., um so er, at einkarætturin veður latin øðrum enn P/F Skálafjarðartunlinum.

Løgtingið hevur í 2009 og 2010 tilsamans játtað kr. 2,1 mió. til ráðgeving í sambandi við ger av sáttmálanum um einkarrætt. Játtanin er brúkt. Um so er at eingin sáttmáli verður gjørdur kemur landskassin at bera hesar útreiðslur.

Verður sáttmáli um einkarrætt harafturímóti gjørdur, kemur tann, sum sáttmáli verður gjørdur við, at rinda landinum allar útreiðslur í sambandi við gerð av sáttmálanum.

2. Endamálið við lógaruppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er eitt ynski at betra undirstøðukervið í Føroyum.

Tað verður roknað við, at tunnilin fer at fremja flytførið munandi og at økja um vøksturin í Føroyum. Eisini verður roknað við, at tunnilin fer at binda føroyska samfelagið meira saman.

Valda loyvismodellið inniber, at tunnilin verður fíggjaður av einum privatum loyvishavara við støði í teimum leypandi inntøkunum hjá tunlinum. Tað verður sostatt ikki latin almennur peningur til verkætlanina.

Fyrimunurin við hesum er lutvíst, at tunnilin kann gerast uttan almenna fígging, lutvíst at váðin, sum er við verkætlanini, heruppií ikki minst óvissan um væntaðu ferðslumongdina og harvið samlaða inntøkugrundarlagið hjá tunlinum, verður hjá tí privata partinum og ikki hjá landsstýrinum. Hóast tunnilin ætlandi kundi verið gjørdur og rikin bíligari, um eitt modell við størri almennari luttøku varð valt, so eru tað fleiri fyrimunir við tí valda modellinum, og sum eisini ger, at tað er møguligt at fremja verkætlanina nú.

Tá einkarætturin í fyrstu syftu ætlandi skal gevast P/F Skálafjarðartunlinum, er hetta grundað á samtyktina hjá Løgtinginum frá 30. apríl 2007 um at byrja samráðingar við felagið um tillutan av einkarætti. Hesar samráðingar vóru tiknar uppaftur á heysti 2009, og tað verður roknað við, at landsstýrið og P/F Skálafjarðartunnilin fara at semjast um eina loyvisavtalu innan 1. november 2010.

3. Gongdin higartil

Henda verkætlan hevur sítt upphav millum einstaklingar í økinum við Skálafjørðin. Hesir tóku seg á heysti 2002 saman í ein bólk við tí endamáli at kanna, um handilsligt grundarlag kundi verið fyri eini tunnilsleið millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy. Á Mikkjalsmessu 2005 lat bólkurin eina frágreiðing úr hondum.

Eftir hetta yvirtók P/F Skálafjarðartunnilin verkætlanina. Tað vóru LÍV og Kaupthing, ið áttu helvt um helvt av partapeninginum. Tá Kaupthing gavst við virksemi sínum í Føroyum, keypti Eik Grunnurin partapeningin hjá Kaupthing. Soleiðis eru tað Eik Grunnurin og LÍV, sum í dag eru javnt stórir partaeigarar í felagnum.

Tann 18. januar 2007 søkti P/F Skálafjarðartunnilin Vinnumálaráðið, sum tá umsat málsøkið, um koncessión til at eiga og reka fast samband millum Suðurstreymoy og armarnar á Skálafirði.

30. apríl 2007 samtykti Løgtingið uppskot til samtyktar um at fyrireika fast samband millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy. Upprunauppskotið varð soljóðandi:

"Løgtingið tekur undir við, at landsstýrismaðurin í vinnumálum fer undir samráðingar við privat felag ella felløg um at gera fast samband millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy og fast samband um Skálafjørðin og samsvarandi hesum leggur fram løgtingslógaruppskot, sum neyvari ásetir treytirnar."

Millum 1. og 2. viðgerð varð uppskotið broytt soleiðis, at orðingin "... samráðingar við privat felag ella felløg ..." bleiv "... samráðingar við privat felag ...". Og soleiðis varð uppskotið samtykt.

Eftir hetta vórðu samráðingar um summarið og út á heystið 2007. Tann 15. november 2007 skrivar P/F Skálafjarðartunnilin Vinnumálaráðnum bræv og heitir á ráðið um at bera so í bandi, at samráðingarnar kunnu førast á mál.

Tá sitandi samgonga varð skipað í september 2008 millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin, bleiv málsøkið landsvegir flutt Innlendismálaráðnum at umsita. Við skrivi, dagfest 30. oktober 2008, lat felagið Innlendismálaráðnum avrit av ymsum skjølum í sambandi við umsóknina.

Eftir nýggjár 2009 fór Innlendismálaráðið undir at samráðast við P/F Skálafjarðartunnilin í framhaldi av teimum samráðingum, sum Vinnumálaráðið frammanundan hevði havt við felagið, tá málsøkið lág har. Sum ein liður í tilgongdini hava Landsverk og P/F Skálafjarðartunnilin hvør sær greitt landsstýrinum frá sínum sjónarmiðum um verkætlanina og herímillum linjuføring. At felagið mælir til og ynskir linjuføring við

rundkoyring er tí, at tað er ein loysn, sum felagið sjálvt, kommunur og onnur á Skálafirðinum taka breitt undir við.

Tá tað ræður um trygd og rundkoyringar í tunlum hava P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk ymisk sjónarmið. Landsverk fylgir normunum hjá norsku vegamyndugleikunum. Landsverk vísir á, at í Noregi verður loyvi bert givið til rundkoyringar, tá einki frægari alternativ er viðvíkjandi trygd, og at rundkoyringar verða ikki nýttar í Norðurlondum annars og í ES. Landsverk hevur tí mælt frá at gera rundkoyring og kann ikki sum vegamyndugleiki góðkenna eina loysn við rundkoyring við teirri grundgeving, at betri alternativ enn rundkoyring eru.

P/F Skálafjarðartunnilin hevur havt norsku ráðgevarafyritøkuna SINTEF at ráðgeva sær. SINTEF hevur gjørt tvær frágreiðingar til P/F Skálafjarðartunnilin við denti á vandan fyri eldi.Vandin er sera lítil sambært felagnum. Fyritøkan SINTEF tekur tó í inngangsorðinum til sína frágreiðing tað fyrivarni, at útrokningar av hesum slagnum vilja byggja á eina rød av fyritreytum og metingum av parametrum, sum eru sera óviss, og at tølini fyri váða (risiko), sum verða givin í frágreiðingini, tí mugu fatast sum heilt leysligar metingar (rene overslag). Í Samandráttinum leggur fyritøkan dent á, at útrokningarnar eru heftar við stórari óvissu, og at úrslitini av váðagreiningini ikki mugu takast sum eksakt virði. Undir hesum fyrivarni kemur SINTEF í greiningunum til, at við lítlari ferðslu er váðin heilt greitt undir tað krav til váða, sum kann góðtakast sum mestamark. Eisini við nógvari ferðslu er váðin niðan fyri hetta mark.

Nevnda mestakrav til váða er hitt sama, sum í 2003 varð nýtt til váðagreiningina av Norðoyatunlinum.

Landsstýriskvinnan í innlendismálum tekur undir við at føra linjuna á tunlinum umvegis eina rundkoyring undir botni, og landsstýrið tekur eisini undir við tí. Fyri at eingin ivi skal vera um trygdina við teirri loysnini, hevur Innlendismálaráðið fingið ráðgevarafyritøkuna Rambøll at ganga ígjøgnum frágreiðingarnar frá SINTEF fyri at meta um tær, at gera eina sonevnda “Second Opinion”. Í tí arbeiðinum hevur Landsverk, sum er landsins tekniski serkunnleiki, dugnað Innlendismálaráðnum í ráðum, so at valda loysnin verður so góð sum gjørligt.

Út frá tí arbeiði, sum verkfrøðingarnir hjá Rambøll hava gjørt, eru teir komnir til, at SINTEF-frágreiðingarnar, hóast manglar, eru væl skjalprógvaðar, og greiddar úr hondum soleiðis, sum vanligt er í slíkum arbeiði. Rambøll hevur nýtt samsvarandi arbeiðshátt, tá teir hava skjalprógvað váðastigið í Oyrasundstunlinum og øðrum stórum tunlum. Váðin við loysnunum, sum kannaðar eru, er á slíkum stigi, sum verður góðtikið, og er ikki størri enn í øðrum tunlum í Europa, sum kunnu samanberast við hesar loysnirnar. Eisini loysnin við eini rundkoyring er á einum stigi, sum kann góðtakast, og Rambøll vísir á, at rundkoyringar verða nýttar í tunlum aðra staðni í Europa, t.d. Finnfast í Noregi, har Rambøll hevur gjørt bruna- og váðagreiningar.

Í frágreiðingini, sum Rambøll hevur latið Innlendismálaráðnum, verður mælt til at nágreina tær útrokningar, sum longu eru gjørdar, við tí endamáli, at so lítil ivi sum møguligt skal vera um trygdina. Hetta arbeiðið er í gongd.

4. Høvuðstættir í lógaruppskotinum

4.1. Tað valda modellið

Í lógaruppskotinum verður lagt upp til, at ábyrgdin fyri at projektera, byggja, fíggja, reka og viðlíkahalda tunnilin í eitt ávíst tíðarskeið verður latin einum privatum loyvishavara, og at hesin afturfyri fær rætt og skyldu til at krevja gjald frá teimum, sum brúka tunnilin í tíðarskeiðnum. Tunnilin verður sostatt gjørdur og rikin sum ein gjaldsvegur, fíggjaður av loyvishavaranum uttan veðhald ella fíggjarligan stuðul annars frá landsstýrinum.

Tá loyvistíðin er farin, skal tunnilin latast landsstýrinum skuldafríur og uttan aðrar byrðar.

Loyvistíðin heldur uppat, tá stovnsíløgan er afturgoldin, og loyvishavarin hevur fingið ein avtalaðan vinning fyri sína íløgu, soleiðis sum tað er nærri ásett í loyvisavtaluni. Í loyisavtaluni fer eisini at vera ásettur ein dagur, sum er seinasti møguligi dagurin at lata landsstýrinum tunnilin, og har tunnilin skal latast landsstýrinum uttan mun til, um loyvishavarin hevur fingið sín væntaða vinning ella ikki.

Grundhugsanin aftan fyri modellið er, at loyvishavarin sum útgangsstøði er tryggjaður ein avtalaðan vinning fyri sína íløgu, við tað at frávik frá væntaðu fíggjarætlanini, t.d. orsakað av hægri byggiútreiðslum ella minni inntøkum, í fyrstu syftu verður javnað við, at avhendingardagurin verður útsettur. Avhendingardagurin fer tó ongantíð at kunna verða seinni enn tann avtalaði seinasti avhendingardagurin, uttan so at tað eru heilt serlig viðurskifti. Uttan mun til um tað møguliga er negativ forrentning av eginognini, skal tunnilin latast landsstýrinum eitt avtalað áramál aftaná, at tunnilin er tikin í nýtslu.

Hvussu hugtøkini “avtalaður vinningur”, “seinasti avhendingardagurin” og “heilt serlig viðurskifti” skulu skiljast, skal avtalast í sambandi við samráðingarnar um loyvisavtaluna. Tað er ein fylgja av lógaruppskotinum, at tað skal tryggjast ein rímilig javnvág í býtinum av váða og fíggjarliga vinninginum hjá loyvishavaranum, og at grundarlagið fyri at gera, reka og fíggja tunnilin er fíggjarliga væl grundað og burðardygt.

4.2. Forkeypsrættur landsstýrisins

Landsstýrið fer til eina og hvørja tíð við eini avtalaðari freist at kunna keypa tunnilin frá loyvishavaranum fyri ein kostnað, sum svarar til tann partin av stovnsíløguni, sum tá ikki er afturgoldin, og við ískoyti av forrentning av íløgukapitalinum. Nærri treytir fyri hesum, heruppií møguleikin at endurrinda loysishavaranum mista inntøku, verður ásett í loyvisavtaluni.

4.3. Linjuføring

Tunnilin verður gjørdur sum eitt vega- og tunnilssamband frá økinum norðan fyri Havnina, sum umvegis eina undirsjóvar rundkoyring, býtir seg sundur til økini við ávikavist Strendur og Runavík. Einkarætturin fevnir eisini um gerð, rakstur og fígging av tilhoyrandi atkomuvegum og íbindingarannleggum.

Talan hevur verið um tríggjar ymiskar linjuføringar. Tvær tær fyrstu eru frá økinum norðan fyri Havnina, eystan fyri Sund til økini við ávikavist Strendur og Runavík við einum sambandi tvørtur um ella undir Skálafjørðin.

Við linjuføring av Sundi til Strendur hevði verið neyðugt at bygt ein undirsjóvartunnil til Runavíkar til ta ferðsluna, sum skal yvir á tann armin av fjørðinum. Ferðsla, sum skal longri norðureftir, hevði tá koyrt inn eftir fjørðinum av Strondum, treytað av at landsstýrið ger ætlaða tunnilin úr Gøtudali yvir í Skálafjørðin, og sum tá gerst ein ískoytisverkætlan. Fyrimunurin við hesari linjuføringini er, at taðsnýr seg um ein lágtliggjandi farveg. Harafturat kann nevnast, at nevndi tunnilin millum Gøtudal og Skálafjørðin í samferðsluætlanini fyri 2008-2020 verður roknaður sum ein framtíðartrygging og stytting av høvuðsvegi.

Við linjuføring til Runavíkar hevði verið neyðugt at bygt ein undirsjóvartunnil til Strendur til ta ferðsluna, sum skal yvir á vestara armin av fjørðinum. Ein ískoytisverkætlan verður tá at gera veg oman fyri Runavík, Søldarfjørð og Gøtugjógv til ferðsluna norðureftir. Vansin við hesi linjuføring er, at vegurin oman fyri Runavík kemur at liggja høgt – upp í 110 m, og høvuðsvegurin verður framhaldandi umvegis Gøtueiði. Vansin við báðum hesum loysnunum er, at stórur partur av ferðsluni skal tvær ferðir til botns, sum uttan iva er orkukrevjandi og hevur við sær økt CO2-útlát, serliga fyri tungu ferðsluna, sum tvær ferðir skal lyfta seg upp frá botninum.

Triðja linjuføringin, sum er tann valda loysnin, er somuleiðis av Sundi. Undir sjónum, sannlíkt undir Saltnesgrynnuni, verður ein rundkoyring, har tunnilin greinar seg. Eina greinin kemur upp á Strondum, og hin greinin kemur upp við Runavík.

Við hesi linjuføringini kemur ferðslan norðureftir at ganga eystureftir og upp í Runavík. Vegurin her er fyri tað mesta í bygdum øki í Runavík, Søldarfirði og Gøtugjógv. Orsakað av at tunnlin við hesi linjuføring hevur við sær økta meirferðslu gjøgnum bygt øki, verður fyrrnevndi vegurin oman fyri Runavík, Søldarfirði og Gøtugjógv tí ein eyka annleggsíløga fyri at leiða ferðsluna uttan um bygt øki.

Fyrimunurin við eini rundkoyring er, at tað er ein meira umhvørvisvinarlig loysn, tí tá verða einans 3 portalar í staðin fyri 4, og tess vegna minni inntriv í landslagið og náttúruna. Harafturat verður hjá parti av tungu ferðsluni einans neyðugt at fara til botns eina ferð í staðin fyri tvær ferðir.

Hinvegin hevur Landsverk, sum er tekniski serkunnleikin hjá landsstýrinum og vegamyndugleiki, havt ein ávísan iva um vegamót ella rundkoyring í tunli, og Landsverk hevur tí ikki hildið seg beinleiðis kunna góðkenna rundkoyringina. Tað skal viðmerkjast, at rundkoyring verður roknað sum besta loysn við vegamót. Tí hevur Innlendismálaráðið fingið til vega eina aðra meting ("second opinion") av teimum váðagreiningum, sum felagið hevur gjørt. Hendan metingin heldur, at váðin kann góðtakast.

Talvan niðanfyri vísir stovnsútreiðslurnar fyri ymisku loysningsmøguleikarnar, roknað samfelagsnytta og onnur tøl.

Eysturoyar-tunnil	Loysn: **Sund – Strendur** + tunnil + tunnil Gøtudal	Loysn: **Sund – Runavík** + tunnil + ringveg	Loysn: **Tunnil við rundkoyring** + ringveg
Cost-benefit (mió. kr.)	2.157	1.860	2.012
Íløga (mió. kr.) uttan avleiddar verkætlanir	953	1.037	1.000
avleiddar verkætlanir (mió.kr.)	171	191	191
Mett byggitíð	5 ár	5 ár	5 ár
Spard tíð (mió.kr)	1.174	1.148	1.173
Spardir kilometrar (mió.kr.)	1.906	1.803	1.850
Spard óhapp (mió. kr.)	567	539	557
Allar útreiðslur og cost-benefit í 2007 prísum. Cost-benefit er íroknað avleiddar íløgur *Upplýsningar frá Landsverk*			

Valið av loysnini við rundkoyring verður grundað á, at hendan loysnin hevur stóra undirtøku bæði í felagnum, hjá kommunum og øðrum við Skálafjørðin, at váðin verður mettur at kunna góðtakast, og at loysnin hevur umhvørvisligar fyrimunir samanborið við hinar loysnirnar.

Sambært verandi verkætlanaruppskoti er høvuðstunnilin 7,1 km. til longdar, greinin vestureftir er 2,1 km og greinin eystureftir er 1,8 km. til longdar. Harafturat skal loyvishavarin gera atkomuvegir.

4.4. Fráboðan av einkarættinum

Lógaruppskotið er gjørt soleiðis, at heimildin í fyrstu syftu er ætlað felagnum P/F Skálafjarðartunlinum. Um landsstýrið ikki brúkar heimildina at geva P/F Skálafjarðartunlinum einkarætt innan 1. november 2010, kann landsstýrið í staðin bjóða einkarættin út í fríari kapping fyri at geva hendan til ein annan loyvishavara. Hetta skal, sbr. serligu viðmerkingarnar, í tíð verða í framhaldi av hesum.

4.5. Avhending av einkarættinum

Einkarætturin kann avhendast, men í fyrsta lagi 2 ár aftaná, at tunnilin er tikin í nýtslu og hevur verið í nøktandi rakstri, uttan so at annað verður avtalað við landsstýrið.

Landsstýrið kann mótmæla eini avhending, eins og landsstýrið til eina og hvørja tíð kann yvirtaka tunnilin.

Loyvishavarin kann tó, so skjótt einkarætturin er fráboðaður, sum liður í eini kapitalisering av felagnum ella orsakað av øðrum handilsligum grundum, kunna avhenda ein nærri ásettan part av partabrøvunum í tí felagnum, sum fær einkarættin, til triðjamann í samsvari við teimum í loyvisavtaluni ásettu treytum fyri hesum. Frá tí degi, tá einkarætturin frítt kann avhendast, kunnu partabrøvini somuleiðis verða frítt avhendaði.

4.6. Einkarætturin fellur burtur

Lógaruppskotið inniber, at rætturin til at byggja og reka tunnilin fellur burtur, um annleggsarbeiðið ikki er byrjað í seinasta lagi tvey ár aftaná dagfestingina av sáttmálanum um einkarættin, og at tað tá stendur landsstýrinum frítt at bjóða einkarættin út í fríari kapping fyri at geva hendan til ein annan loyvishavara.

Hetta er ikki galdandi, um manglandi byrjan av annleggsarbeiðinum er orsakað av force majeure, ella um partarnir hava gjørt eina avtalu um at leingja tíðarskeiðið.

Fellur einkarætturin burtur, ber loyvishavarin sjálvur váðan fyri egnar útreiðslur.

5. Hvør hevur ummælt uppskotið og innkomnar hoyringsviðmerkingar

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum, Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, P/F Skálafjarðartunlinum og Landsverk.

Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum.

1. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur

Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

2. Mettar umsitingarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

3. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri vinnuna

Uppskotið verður mett at hava fleiri jaligar avleiðingar fyri vinnulívið. Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar fyri vinnulívið.

4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Ætlaða linjuføringin liggur ikki langt frá Toftavatni, ið er eitt ógvuliga serstakt náttúruøki við nógvum fjølbroyttum djóra-, plantu- og fuglalívi. Fjølbroytta djóralívið og serliga fuglalívið hevur stóran týdning fyri økið. Tí er Toftavatn og økið har serliga viðbrekið, og hetta eigur tað at verða tikið serligt atlit til.

Í annleggstíðini verður neyðugt við tiltøkum til at fyribyrgja dálking av strondum og áum v.m. Tá tað ræður um tilfarið frá boringini, verður eisini neyðugt at verja økið.

Boring, spreinging og lastbilaferðsla kann verða til bága fyri fugla- og djóralívið, og tí eigur arbeiðið at verða skipað soleiðis, at tað er til minst møguligan ampa. Tað er tó neyvan fíggjarliga sannlíkt, at tað fer at bera til at tíðaravmarka arbeiðið.

Økt ferðsla í økinum hevur við sær óljóð og luftdálking, tó mest í meldurtíðini og í góðum veðri, tá stilli er.

5. Serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Royndir, bæði úr útlondum og her heima vísa at ein tunnil skapar aktivitet í økjum har han liggur. Við økingini í ferðsluni, ið verður millum Eysturoy og Streymoy, má tað sama metast at fara at gera seg galdandi í hesum føri.

6. Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið verður ikki mett at hava sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

7. Hava millumtjóða sáttmálar við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnunua

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum ella ávísar samfelagsbólkar. Tó verður mett at tunniln fer at fáa jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

8. Áleggur uppskotið fólki skyldur t.d. upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi, skal verða greitt frá umsitingarligu avleiðingunum av hesum

Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar við sær fyri vanliga borgaran.

9. Verða heimildir lagdar til annan landsstýrismann, ella til kommunur útyvir kommunustýrislógina, skal greiðast frá teimum fyrilitum, ið grundgeva hetta.

Sambært uppskotinum verða heimildir ikki latnar til annan landsstýrismann, ella kommunur.

10. Fáa almennir myndugleikar atgongd til privata ogn, skal grundgevast fyri hesum og greiðast frá vavinum av heimildini.

Sambært uppskotinum hevur landsstýrismaðurin tær heimildir sum eru ásettar í landsvegalógini jbr. viðmerkingarnar til § 12.

11. Skema

	Fyri landið /landsmyndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar /búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Ja	Ja	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða reglur og avtalur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Ásett verður, at endamálið við lógini er at skipa grundarlagið og karmarnar fyri at geva tíðaravmarkaðan einkarætt til at gera, reka og fíggja eitt vega- og tunnilssamband undir Skálafjørð og Tangafjørð.

Til § 2

Stk. 1. Heimildin hjá landsstýrinum at geva einkarætt til felagið P/F Skálafjarðartunnilin. Tað sæst, at tilhoyrandi atkomuvegir og atkomuannlegg eisini eru fevnd av einkarættinum.

Stk. 2. Einkarætturin til P/F Skálafjarðartunnilin skal verða givin innan 1. november 2010.

Heimildin er í fyrstu syftu ætlað til P/F Skálafjarðartunnilin, sum landsstýrið longu hevur havt samráðingar við, grundað á samtykt løgtingsins frá 30. apríl 2007.

Tann 1. november 2010 er ásettur við umhugsni fyri at tryggja pørtunum nóg mikið av tíð at hava samráðingar, samstundis at tað skal vera eitt ávíst trýst fyri at faa hesar endaðar.

Stk. 3. Eyðnast tað ikki at gera eina loyvisavtalu innan 1. november 2010, so fellur einkarætturin burtur, um landsstýrið ikki í staðin velur at bjóða einkarættin út í fríari kapping fyri at kunna geva einum øðrum loyvishavara einkarættin. Í einum slíkum føri verður landsstýrinum heimilað at gera eina loyvisavtalu í samsvari við treytirnar í hesi lógini við tann tilboðsgevaran, sum hevur tað samanumtikið besta fíggjarliga boðið.

Við útboð verður einans miðað eftir eini kappingarútseting. Tað ersostatt nóg mikið, at meira enn ein partur verður boðin til samrøðu við landsstýrið. Tað verður gingið út frá, at kappingarútsetingin í tíð verður samanhangandi við 1. november 2010. Tað snýr seg sostatt ikki um eina standandi heimild til landsstýrið, sum kann verða brúkt uttan tíðaravmarking.

Stk. 4. Einkarætturin verður givin grundað á eina loyvisavtalu millum landsstýrið og loyvishavaran.

Stk. 5. Einkarætturin verður givin móti, at loyvishavarin rindar landsstýrinum viðskiftisútreiðslurnar í sambandi við gerð av loyvisavtaluni, tó í mesta lagi ávikavist 10 mió. DDK og 15 mió. DDK, treytað av um einkarætturin verður givin P/F Skálafjarðartunlinum ella til ein annan loyvishavara sambært § 2, stk. 3.

Við hesum verður skyldan hjá P/F Skálafjarðartunlinum at gjalda aftur viðskiftisútreiðslur landsstýrisins førd víðari, um so er, at samráðingargongdin endar við eini endaliga bindandi loyvisavtalu, sbr. letter of intent frá 10. desember 2009.

Sum viðskiftisútreiðslur verða roknaðar veruligu útreiðslur landsstýrisins til fundarvirksemi, ferðaútreiðslur, útinning av eyka tekniskum kanningum umframt ómaksløn til uttanhýsis ráðgevar landsstýrisins.

Tá mestaupphæddin er hægri í mun til tillutan til ein annan loyvishavara, so er hetta orsakað av øktum viðskiftisútreiðslum, sum avleiðing av eini kappingarútseting og nýggjum samráðingum um gerð av avtaluni.

Løgtingið hevur í 2009 og 2010 tilsamans játta kr. 2,1 mió til ráðgevning í sambandi við verkætlanina. Játtanin er brúkt.

Um so er at eingin sáttmáli verður gjørdur um einkarrætt kemur landskassin at bera hendan kostnað. Verður hinvegin sáttmáli gjørdur, kemur tann, sum fær einkarrættin, at endurrinda landinum allar útreiðslur í sambandi við gerð av sáttmálanum um einkarrætt.

Til § 3

Her verður víddin á einkarættinum staðfest. Tað sæst, at loyvishavarin hevur skyldu til fyri egna rokning og váða bæði at projektera, byggja, reka, viðlíkahalda og fíggja tunnilin. Ætlanin við hesum er at albøta heildarbúskapin í projektinum við at samanhugsa anlegg, tunnilsrakstur og viðlíkahald og fígging. Samstundis sæst í ásetingini, at loyvishavarin ikki einans hevur rætt til, men eisini skyldu til at krevja gjald frá teimum, sum nýta tunnilin. Loyvishavarin kann tess vegna ikki loyva nøkrum ávísum at nýta tunnilin ókeypis.

Tað sæst eisini, at innkrevjingin skal vera sambært meginreglunum í hesi lóg, heruppií § 9, stk. 1, litra b. Sjálvt um útgangsstøðið er, at tunnilin skal rekast við handilsligum treytum og við fríari prísáseting, so skal hetta samstundis vera við umhugsni fyri at tryggja eitt hóskandi og fíggjarliga atkomuligt undirstøðukervi undir umhvørvisligum burðardyggum treytum. Hetta kann møguliga verða tryggjað við at brúka sundurbýttar prísir. Við møguleikanum hjá landsstýrinum til eina og hvørja tíð at kunna keypa tunnilin frá loyvishavaranum, verður væntað, at loyvishavarin leypandi fer at taka landsstýrið við fyri støðugt at tryggja eina hóskandi prísskipan. Broytingar í prísunum skulu fráboðast brúkarunum av tunlinum við minst tríggjar mánaða freist.

Til § 4

Einkarætturin hevur ikki við sær avmarkingar í mun til rætt landsstýrisins annars at fremja ætlanir um undirstøðukervið. Landsstýrið kann sostatt framhaldandi gera onnur sambond, heruppií gera nýggjar vegir og tunlar.

Stk. 2. Landsstýrið hevur tó skyldu til at endurgjalda loyvishavaranum við kontantum gjaldi fyri tap, sum beinleiðis kann setast í samband við ítøkiligar, framdar ætlanir, sum kappast við tunnilin, orsakað av minni ferðslu í tunlinum, uppgjørt sum munurin millum miðal ferðslumongdina seinasta árið framman undan fremjingini av undirstøðukervisætlanini og miðal ferðslumongdina árið aftaná. Tað áliggur loyvishavaranum at skjalprógva, at ferðslan er minni, og at hetta kann beinast til ítøkiligu ætlanina. Upphæddin, sum verður endurgoldin, fevnir um ta minkaðu inntøkuna fyri restina av loyvistíðarskeiðnum.

Loyvishavarin er einans fyri missi, um minkaða inntøkan ikki kann javnast við, at tunnilin verður avhendaður seinni enn ætlað, møgiliga eisini seinni enn seinast ásetti avhendingardagurin. Í hesum føri er tað sostatt ætlanin, ið ber váðan fyri lægri inntøkum, av tí at loyvishavarin framhaldandi fær avtalaða vinningin av íløguni í øllum loyvistíðarskeiðnum. Einans í tí føri, at tann lægra inntøkan ikki kann javnast við eina seinni avhending, hevur landsstýrið skyldu til at endurgjalda loyvishavaranum við kontantum gjaldi. Útgjald av einum endurgjaldi kann ongantíð fara upp um eina upphædd, sum gevur loyvishavaranum eina hægri forrentning enn væntaði "avtalaði vinningurin".

Stk. 3. Landsstýrið hevur ikki skyldu til at endurgjalda loyvishavaranum við kontantum gjaldi, um so er, at tað snýr seg um fyribils broytingar í undirstøðukervinum, orsakað av vanligum viðlíkahaldi av vegum, tunlum o.ø.

Broytingar í undirstøðukervinum fevna ikki um stilling av avgjøldum, broyting av frádrátti fyri flutning ella aðrar stillingar av fiskalum slagi, sum kunnu hava týdning fyri ferðsluna.

Til § 5

Ásetingin hevur við sær, at einkarætturin kann avhendast.

Stk. 2. Avhending av einkarættinum til ognar kann í fyrsta lagi fara fram tvey ár aftaná, at tunnilin er tikin í nýtslu og hevur verið nøktandi í rakstri, um ikki annað verður

avtalað við landsstýrið. Við hesum verður tryggjað, at tað er tann loyvishavarin , sum fær einkarættin tillutaðan, sum hevur ábyrgdina fyri at projektera og byggja tunnilin.

Stk. 3. Avhending skal fara fram við fullari virðing fyri rætti landsstýrisins sambært tí gjørdu loyvisavtaluni.

Stk. 4. Landsstýrið kann einans mótmæla eini avhending, tá heilt avgerandi saklig fyrilit fyri manglandi fíggjarligari ella fakligari styrki hjá tí komandi partinum stuðla undir hesum. Ásetingin hevur við sær, at landsstyrið einans í undantaksførum kann mótmæla eini avhending.

Stk. 5. Landsstýrið kann tó mótmæla eini avhending, um landsstýrið sjálvt ynskir at yvirtaka tunnilin. Ásetingin gevur landsstýrinum ein forkeypsrætt. Treytirnar fyri yvirtøkuni, heruppií yvirtøkukostnaðurin, verða ásettar í loyvisavtaluni.

Stk. 6 og 7. Her verða nakrar freistir ásettar.

Loyvishavarin kann tó, uttan mun til § 5, so skjótt sum einkarætturin er fráboðaður, sum liður í eini kapitalisering av felagnum ella orsakað av øðrum handilsligum grundum, kunna avhenda ein nærri ásettan part av partabrøvunum í tí felagnum, sum fær einkarættin, til triðjamann í samsvari við teimum í loyvisavtaluni ásettu treytunum fyri hesum. Frá tí degi, tá einkarætturin frítt kann avhendast, kunnu partabrøvini somuleiðis verða frítt avhendaði.

Til § 6

Í ásetingini sæst, at rætturin at byggja og reka tunnilin fellur burtur, um so er, at anleggsarbeiðið ikki er byrjað í seinasta lagi tvey ár aftaná dagfestingina av sáttmálanum um einkarætt, og at tað tá stendur landsstýrinum frítt at bjóða enkarættin út í fríari kapping fyri at geva hendan til ein annan loyvishavara, jb. viðmerkingarnar til § 2, stk. 3.

Við byrjan av anleggsarbeiðinum verður skilt, at tað skulu vera tikin verulig stig til at fyrireika anleggsarbeiði, t.d. í gjørdum arbeiðstøkusáttmálum og í byrjan av byggiplássi. Tað skulu sostatt vera verulig tekin um, at ætlanin verður gjøgnumførd.

Stk. 2. Hetta er ikki galdandi, um orsøkin er force majeure. Sum force majeure hending verður roknað serstøk viðurskifti, sum eru íkomin, uttan at loyvishavarin hevur nakra ábyrgd av hesum, og sum loyvishavarin ikki sjálvur hevur ræði á, t.d. kríggj, uppreistur, yvirgangsvirksemi, herverk, náttúruvanlukkur, aðalverkfall, aðalverkbann, og sum loyvishavarin ikki, tá loyvisavtalan varð undirskivað, átti at hava havt fyrilit fyri ella átti at hava sloppið sær undan ella vunnið á.

Stk. 3. Hetta er heldur ikki galdandi, um partarnir hava avtalað eina leinging av tíðarskeiðnum, um serlig viðurskifti tala fyri hesum. Við serlig viðurskifti verður skilt, t.d. at tað ikki eru útlit til, at ætlanin kann gjøgnumførast á nakran annan hátt við, at ein annar loyvishavari yvirtekur einkarættin ella at landsstýrið sjálvt fremur ætlanina.

Umframt at landsstýrið er frítt stillað, merkir ásetingin eisini, at loyvishavarin frá hesum tíðarhvarvi ikki longur hevur skyldu til at gera og reka tunnilin, men kann fara úr gjørdu loyvisavtaluni sambært teimum ásetingum, sum eru í avtaluni, heruppií treytirnar fyri møguligari afturføring av byrjaðum arbeiði.

Stk. 4. Loyvishavarin ber sjálvur váðan fyri egnar útreiðslur, sum eru brúktar sum liður í at fremja verkætlanina, heruppií útreiðslur til kanning av undirgrundini og at fyrireika og fremja eitt útboð um anleggsuppgávuna.

Stk. 5. Tá einkarættur fellur burtur, hevur landsstýrið rætt til, heilt ella lutvíst, at yvirtaka úrslit av framdum kanningum og gjørdum skitsum, ætlanum og tekningum, sum eru gjørdar at brúka til gerð av tunlinum v.m., móti einum rímiligum fíggjarligum endurgjaldi. Við rímiligum fíggjarligum endurgjaldi verður skilt tær skjalprógvaðu útreiðslurnar, sum loyvishavarin sjálvur hevur rindað.

Stk. 6. Um ætlanin verður framd innan eitt tíðarskeið upp á 4 ár aftaná, at einkarætturin er fallin burtur, antin av landsstýrinum sjálvum ella av einum øðrum loyvishavara enn honum, sum upprunaliga fekk einkarættin, og fremjanin av ætlanini í ikki týdningarleysan mun er grundað á úrslit av kanningum hjá upprunaliga loyishavaranum, hevur landsstýrið skyldu til at endurgjalda hesum allar útreiðslur, sum eru rindaðar í sambandi við verkætlanina, tó í mesta lagi 25 mió. DDK. Við fremjan verður skilt, at tunnilin skal vera bygdur og klárur at taka í nýtslu.

Stk. 7. Hetta er ikki galdandi, um einkarætturin er fallin burtur orsakað av umstøðum, sum eru ásettar í § 8.

Til § 7

Tað sæst í ásetingini, at einkarætturin heldur uppat, samstundis sum tunnilin verður avhendaður til landsstýrið, sbr. meginreglurnar um hetta í § 9, stk. 1.

Til § 8

Landsstýrið kann taka einkarættin aftur, um loyvishavarin grovliga ella ferð eftir ferð skúgvar til viks skyldur sínar sambært hesi lóg og gjørdu loyvisavtaluni. Við afturtøku ognast tunnilin landsstýrinum sambært ásettu treytunum í loyvisavtaluni.

Manglandi framdrift í anleggsskeiðnum, sum einans er grundað á viðurskifti hjá loyvishavaranum, verður roknað sum ein grov skúgvan til viks av skyldunum hjá loyvishavaranum. Hvat annars verður skilt við grova og endurtikna skúgvan til viks av sínum skyldum, verður nærri ásett í loyvisavtaluni.

Til § 9

Í ásetingini verða staðfestar fleiri meginreglur fyri útinnanini av einkarættinum.

Stk. 2. Meginreglurnar verða neyvari lagdar fram í loyvisavtaluni. Meginreglurnar eru nærri útgreinaðar í almennu og serligu viðmerkingunum. Tað snýr seg um nakrar almennar meginreglur, og avtalan skal gerast innan karmarnar av hesum. Partarnir hava sostatt fingið tillutað eina ávísa liðiligheit í samráðingartilgongdini, soleiðis at møgulig minni frávik ikki treyta, at lógin má broytast.

Til § 10

Áðrenn sjálvt anleggsarbeiðið byrjar og í byggitíðini fara at verða rindaðar munandi útreiðslur til m.a. forkanningar, byggirentur v.m. Hesar útreiðslur kunnu ikki dragast frá, tá tað ikki eru rakstarinntøkur í byggitíðarskeiðnum.

Fyri at sleppa undan øllum iva, um gerð av einum vega- og tunnilssambandi kann javnsetast við ein ídnaðarbygning, er hetta ásett i lógini.

Stk 2. Her verður nágreinað, at rætturin til skattligar avskrivingar er tilskilaður tí felagnum, sum hevur fingið einkarættin.

Til § 11

Fyri at sleppa undan øllum iva um hetta, verður ásett í greinini, at virksemið hjá loyvishavaranum er meirvirðisgjaldskyldugt, og at loyvishavarin hevur rætt at fáa útgangandi meirvirðisgjaldið endurgoldið og skyldu til at avrokna inngangandi meirvirðisgjald. Tað sæst eisini, at tað er ein treyt, at ferðaavgjald er meirvirðisgjaldskyldug veiting.

Við hækkan av meirvirðisgjaldsatsinum fyri ferðaavgjald frá verandi satsi uppá 0 pst., hevur felagið rætt til endurgjald fyri møguligt hall orsakað av hesum. Loyvishavarin hevur einans hall, um hækkaða útreiðslan ikki kann javnast við, at tunnilin verður avhendaður seinni enn ætlað, møguliga eisini seinni enn seinast ásetti avhendingardagurin, sbr. viðmerkingarnar til § 4, stk. 2. Tað áliggur loyvishavaranum at skjalprógva, at hann hevur havt eitt hall.

Til § 12

Stk. 1. Staðfest verður, at tunnilin ikki er ein partur av landsvegakervinum. Hetta merkir, at tað ikki er vegamyndugleikin, men loyvishavarin, sum er vegamyndugleiki við teimum fíggjarligu og øðrum skyldum, sum áliggja einum vegamyndugleika.

Stk. 2. Sjálvt um vegamyndugleikin er hjá loyvishavaranum, hevur landsstýrismaðurin uttan mun til hetta tær heimildir, sum landsvegalógin og ferðslulógin geva honum.

Stk. 3. Tað verður nágreinað, at skipan av ferðsluni í tunlinum fer fram eftir somu reglum og leiðreglum sum fyri landsvegir.

Stk. 4. Loyvishavarin kann ikki verða kravdur at gjalda fyri íbinding til landsvegin.

Stk. 5. Tað áliggur loyvishavaranum at gera og rinda útreiðslur í sambandi við møguliga umskipan av landsvegnum. Hetta merkir, at loyvishavarin eisini fyri egna rokning skal fáa í lag, at møgulig óbrúkt vegastrekkir verða frágingin soleiðis, at tey ikki misprýða náttúruna. Harafturat verður nágreinað, at um eitt íbindingaranlegg trívur inn í ein verandi landsveg, skal íbindingaranleggið, tá arbeiðið er liðugt, verða partur av tí samanhangandi landsvegakervinum, sum landsstýrið eigur.

Til § 13

Linjuførngin er ikki endaliga ásett, tí tað skulu gerast fleiri kanningar, heruppií ein stýrd kjarnuboring, sum verður roknað sum týdningarmikil fyri avgerðina um endaligu

linjuføringina. Ásett verður, at linjuføringin verður frá økinum norðan fyri Havnina til Strendur og Runavík.

Til § 14

Landsstýrismaðurin verður heimilaður móti fullum endurgjaldi at ognartaka neyðugt øki ella tilfar til at fremja verkætlanina, um so er, at tað ikki við samráðingum eydnast at finna eina semju við teir ymisku rættindahavararnar um yvirtøku av øki ella tilfari. Eisini er ásett, at landsstýrið skal avhenda tað ognartiknað til loyvishavaran fyri útveganarkostnað.

Til § 15

Ásett verður, at loyvishavarin hevur rætt til uttan kostnað at fáa upplýsingar frá bilaskránni um eigarar/brúkarar av bilum, við tí endamáli at kunna krevja og ansa eftir, at hesir gjalda fyri at brúka tunnilin.

Til § 16

Ásetir gildiskomuna.

Innlendismálaráðið, dagf.

Annika Olsen,
landsstýriskvinna

/ Rúni Joensen